Hoyringssvar frá Deyvafelag Føroya til MEGD

LM-025/2023 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) (Heilivágsstigin verður broyttur)

Deyvafelag Føroya harmast um at egingjaldið til heilivág hækkar í so stóran mun, sum lýst er lógaruppskotinum. Nógvir av okkara limum brúka nógvan heilivág, og eru samstundis láglønarbólkur – annaðhvørt fyritíðar- ella fólkapensjonistar, ella eru í tillagum størvum, har lønarvøksturin ikki er eftir somu skipanum sum hjá øðrum løntakarum. Limir okkara – sum øll onnur - eru rakt av prísvøkstri, eisini á heilivágsøkinum

Tí. er tað sera hugstoytt at egingjaldð til heilivág fyri flestu kemur at vera 3.100 kr. áðrenn tilskot verður latið, og væl at , merkja bert til heilivág har tilskot er ásett. Heilsumálaráðið má absolutt eisini hyggja eftir heilivági har onki tilskot er á yvirhøvur, og um tað er rímiligt?

Deyvafelag Føroya heitir á Heilsumálaráðharran at umhugsa uppskotið av nýggjum

LM-023/2023 : Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk (Frávik um stuðulsveiting til lesandi í útbúgvingaraldri strikað

Í grundgevingini fyri uppskotinum er orðavalið rættiliga mótsigandi: “ Ung við serligum tørvi verða sostatt javnsett við lesandi, ið ikki hava serligan tørv.” Tað ber als ikki til – Serliga ikki tá tørvurin er lívslangur ! Hvussu familjur húsast, sum hava børn undir útbúgving, fer Deyvafelag ikki at blandað seg upp í. Tó vita vit , at tað hjá ungum deyvum og hoyritarnaðum, kann vera trupult at finna sær størv aftan á skúlatíð, serliga har samskifti er ein avbjóðing

Fleiri av okkara ungu og ungu vaksnu hava ikki orku til at hava lestrarstørv. Deyv brúka eyguni at lurta við, og tí eru tey sum oftast sera móð aftan á ein

skúladag. Har tey alla tíðina skulu vera árvakin, fyri at fylgja við tulki, undirvísara, og floksfelagum, so í nógvum førum tekur lesturin alla orku, og onki er eftir til møguliga at forvinna sær eitt oyra afturat. Eisini tekur heimafyrireiking longri tíð enn hjá hoyrandi. Tað er heilt vanligt at deyv og hoyritarnaði hava longri lestrartíð enn onnur. Okkara deyvblindu limir eru uppaftur meira skerdir í hesum samanhangi. Alt hetta orsøkir til at tað kann vera trupult at arbeiða aftan skúlatíð. Tað kann undra ein at, tá ein lesandi er fevndur av LAT, at ikki skal umfata allan gerandisdagin , tí tá er tarn longu staðfest. – so virkistarn til at forvinna er longu staðfest – kostnaðarstøðið er hitt sama hjá øllum.

Viðmælast kann eisini at stuðulsskipan verður sett á stovn undir Studna, soleiðis at deyv lesandi, ið ikki eru undir arbeiðsbúgving, kunnu søkja sær eitt “brekískoyti” eins tað finnist í okkara grannalondum (Handicaptillæg) Har virkistarnið er grundarlag fyri stuðli.